# Samgonguflokkarnir stuðla áganginum hjá Karsten Hansen móti teimum ófaklærdu

**Staðfest er, at Karsten Hansen hevur lagt seg beinleiðis út í sáttmálasamráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum, har hann hevur roynt at kroyst semingsstovnin at seta sera trongar karmar fyri lønarhækkingum fyri vanliga tímalønta arbeiðaran.**

**Amboðið, sum Karsten Hansen hevur brúkt er sáttmálin millum Maskinmeistarafelagið og SEV, har landsstýrismaðurin undir semingsroyndunum á privata arbeiðsmarknaðinum kemur alment fram við, at hann ikki kann góðtaka lønarhækkingina hjá maskinmeistarunum hjá SEV.**



## Karsten Hansen

veit, at vanliga er tað soleiðis at fakfeløg undir sáttmálasamráðingum vísa til lønarvøkstur hjá øðrum løntakarabólkum, og hetta er einasta orsøkin til, at landsstýrismaðurin nú kemur alment fram við, at hann ikki kann góðtaka lønarhækkingina í sáttmálanum millum Maskinmeistarafelagið og SEV.

Hendan fráboðan kom í gjár til fjølmiðlarnar, hóast:

- tað er meira enn 5 vikur síðani sáttmálin millum Maskinmeistarafelagið og SEV varð undirskrivaður,
- at landsstýrismaðurin ikki aftan á, at nevndi sáttmáli varð undirskrivaður hevur gjørt vart við seg yvirhøvur,
- at maskinmeistarnir hjá SEV 2 ferðir hava fingið løn útgoldna eftir nýggja sáttmálanum,
- at Landsstýrið ikki tey seinastu 15-20 árini hevur lagt seg út í lønarsáttmálarnar millum Maskinmeistarafelagið og SEV

## Hesir flokkar taka undir við áganginum hjá Karsten Hansen móti fakfeløgunum hjá teimum ófaklærdu:



Fólkaflokkurin



Tjóðveldisflokkurin



Miðflokkurin



Sjálvstýrisflokkurin

**Helst eru tað bert umboðini fyri hesar flokkar, sum ikki duga at síggja, at Karsten Hansen við almennu fráboðan sínari miðvíst hevur roynt at sett sera avmarkaðar karmar fyri lønarvøkstrinum á privata arbeiðsmarknaðinum, og sostatt hevur roynt at forða feløgum okkara í frítt at samráðast um okkara egnu sáttmálaviðurskifti.**

Føroya Arbeiðarafelag — Havnar Arbeiðsmannafelag — Havnar Arbeiðskvinnufelag

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag — Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag



# SEV um lønarsáttmálar hjá maskinmeistarum

TÍÐINDASKRIV

*Poul Arni Jacobsen, stýrisformaður*

Í sambandi við umrøðuna í fjølmiðlunum av lønarsáttmálanum millum SEV og Maskinmeistarafelagið skal verða kunnað um, at gongdin í málinum hevur verið hendan:

1. Sáttmálin varð av Maskinmeistarafelagnum uppsagdur at fara úr gildi tann 1. mars 2003.

2. Maskinmeistarafelagið sendi SEV tann 25. februar 2003 uppskot til nýggjan sáttmála, og varð sáttmálin samstundis longdur at galda til 10. mars á midnátt.

3. Áðrenn samráðingarnar byrjaðu, royndi SEV uttan úrslit bæði um telefon og skrivtliga at fáa fund í lag við Fíggjarmálaráðið við ynski um at viðgera komandi lønarsamráðingarnar.

4. Á fyrsta samráðingarfundi tann 5. mars settu umboðini fyri SEV fram uppskot um at leingja sáttmálan til 1. oktober 2003 við ávísari lønarhækking.

Hettar varð avvíst, og hildu teir fast við, at samráðingarnar skulu snúgva seg um 2-ára sáttmála.

5. Tann 13. mars høvdu partarnir nátt til eina semju, sum skuldi viðgerast av stýrinum fyri SEV.

Fíggjarmálaráðið (Lønardeildin) varð kunnað um úrslitið.

6. Við skrivi frá 20. mars heitti FAG á stýrið fyri SEV um ikki at góðkenna samráðingarúrslitið, men útseta teir, til "stóru" sáttmálarnir á arbeiðsmarknaðinum eru avgreiddir.

Stýrið avgjørdi tí at biðja um fund við Fíggjarmálaráðið og FAG.

Hesin fundur var 27. mars. Á fundinum greiddu umboðini fyri SEV frá samráðingarúrslitinum og gjørdu samanburð við aðrar galdandi sáttmálar, sum Fíggjarmálaráðið og FAG hava gjørt, og sum í lønarhækkingum liggja omanfyri samráðingarúrslitið hjá SEV.

Karstin Hansen gjørdi vart við, at hann kundi ikki góðtaka eina so stóra lønarhækking.

Onnur umboð fyri Fíggjarmálaráðið gjørdu vart við, at tað er ikki siðvenja hjá landsstýrinum at geva SEV formella góðkenning av teirra sáttmálum.

Á fundinum var semja um, at SEV átti at royna at taka samráðingarnar uppaftur við tí fyri eygað at tilpassa sáttmálalongdina soleiðis, at sáttmálin fer úr gildi samstundis við ella aftan á teir "stóru" sáttmálarnar á arbeiðsmarknaðinum.

7. Á stýrisfundi tann 28. mars fekk stýrisformaðurin heimild at undirskriva sáttmálan, men varð honum álagt áðrenn undirskriving at royna at fáa broytt sáttmálan.

8. Síðani var fundur við Maskinmeistarafelagið sama seinrapart. Maskinmeistarafelagið avvísti at samráðast um broyting av samráðingarúrslitinum. Aftaná fundin fekk SEV handað eitt skriv frá Maskinmeistarafelagnum hesum viðvíkjandi og við frásøgn um, at um sáttmálin ikki verður undirskrivaður beinanvegin, so er sáttmálaloysi, og felagið má umhugsa, hvørji stig skulu takast í hesum sambandi.

Hettar gjørdi, at avgjørt varð at undirskirva sáttmálan sama dag, t.v.s. tann 28. mars.

9. Sama dag varð fíggjarmálaráðharrin kunnaður um hettar, og varð tíðindaskriv eisini sent út.

Í vikuni eftir varð endaligi sáttmálin og annað tilfar sent Fíggjarmálaráðnum, men hevur SEV onki hoyrt aftur fyrr enn í gjár í samrøðu millum stýrisformannin og fíggjarmálaráðharran.

10. Av hesi samrøðu hevur stýrisformaðurin skilt, at fíggjarmálaráðharrin kann ikki góðtaka sáttmálan og at tað var skeivt av SEV at praktisera sáttmálan áðrenn landsstýrisins góðkenning.

11. Hervið má staðfestast, at fíggjarmálaráðharrin hevur broytt áður galdandi siðvenju, og verður tí neyðugt hjá SEV at taka avleiðingarnar av hesum.

Tí er avgjørt nú beinanvegin at venda aftur til at umsita maskinmeistaralønirnar eftir gamla sáttmálanum, sum varð uppsagdur til 1. mars

Fundur er avtalaður við Fíggjarmálastýrið í morgin kl. 8.30 og við Maskinmeistarafelagið kl. 9.00.

# 31 náðardropar

BÓKAÚTGÁVA

*Tíðindaskriv*

Í farnu viku gav HMF (Heimamissiónsforlagið) út andaktsbókina Dropar av náði, sum Tofleif Johannesen, sjómanstrúboðari hevur skrivað. Andaktirnar hava fyrr staðið í FF blaðnum.

Bókin, sum er 69 síður, hevur 31 smá andaktsstykkir – eitt til hvønn dag í mánaðinum. Bókin er lítil og handalig og kundi til dømis verið vælegnað til at liggja á soviborðinum, í messuni ella á køksendanum.

Torleif Johannesen, sum er sjómanstrúboðari hjá Heimamissiónini og høvundur av bókini, valdi heitið á bókini av eini serligari orsøk:

– Guds náði er sum ein stór, djúp og ótømandi kelda. Meiri tú drekkur úr henni, tess meira tráðar tú eftir at drekka av henni. Tey 31 andaktsstykkini í hesi bók eru sum smáir dropar úr hesi keldu. Hóast droparnir eru ymiskir, er endamálið eitt og tað sama: at bera tær nakað av Guds ótømandi náði, sum hann vil veita tystandi syndarum í og við Jesus Kristi. Dropar sløkkja ongan tosta. Teir skapa tó ein longsul eftir at fáa meiri at drekka, skrivar Torleif á baksíðuni.

Andaktsbókin, sum er ein vælegnað gáva til øll, útróðrarfólk ella ikki. Hon fæst í bókahandlum kring landið og hjá forlagnum í Nesvík fyri einans 89 krónur.





